Kringvarpið eigur ikki at sleppa at kritisera okkara fólkavaldu. Segði nakar Gaddafi?
**Maður, 45 ár**

LAGT TIL RÆTTIS:
Eyðun Klakstein

# Miðlamiarr



*Hevði ikki verið so galið at sloppið á ólavsøku fyri fyrstu ferð í átta ár.*
Málverjin Gunnar Nielsen, sum er skaddur (Sosialurin)

*Vit læra eina rúgvu um okkara persónligu eginleikar, tá vit kroysta okkum út á markið.*
Jan Pytlick, hondbóltsvenjari, um at átaka sær stórar uppgávur.





*Eingin meining sleppur fram at í miðlunum, uttan hon skal sáldast og sílast. Úrslitið er ein politisk viðmerking, sum ongar tenn hevur eftir í heysinum.*
Løgtingsmaðurin Óli Breckmann um kjakið í almennu miðlunum (Hvonn Live)



*Vit tosa um tað nú, so vit fáa at síggja.*
Sjónleikarin Gwyneth Paltrow hevur gjørt vart við seg sum sangara og samráðist nú við plátufelag um útgávu.

Um eg arbeiddi onkrastaðni og ikki framleiddi tað, sum væntað varð av mær, so hevði tað havt avleiðingar. Hvørjar avleiðingar hevur tað fyri føroyskar lærarar at teirra næmingar ikki klára seg betri? Hvussu ber tað til at onnur størv verða dømd eftir prestatión, meðan lærarastarvið ikki verður tað?
**Maður, 27 ár**

*Ég havi ikki nakran sjeik enn, men um tað er onkur, sum kundi hugsað sær at farið út við mær, so kunnu tit kom fram her til pallin.*
Danska tennisstjørnan Caroline Wozniacki í góðum lag í talkshowi á Crowne Plaza í Keypmannahavn (BT)

*Anders Fogh Rasmussen er uttan sammeting tann rotnasti persónurin, sum eg havi hitt. So hálur, at eg undraðist.*
Jónheðin Herason Tróndheim svarar spurningum í Vikublaðnum





Tey krevja at føroyingar skriva KILI sum Chile... skulu tey so eisini krevja, at útlendingar skriva ikki MIDVAGUR, men Miðvágur, sum tað verður skrivað á upprunamálinum?
**Maður, 36 ár**